# Heidi setti trý heimsmet

**Heidi Andreasen vann gull í øllum teimum fimm kappingunum, sum hon luttók í**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Heidi Andreasen gjørdi eitt ordiligt hál í stóru svimjikappingini í Edmonton í Kanada. Tríggjar ferðir setti hon heimsmet, og hon vann fimm gullmerki.

Hon setti heimsmet í 50 metur firvaldasvimjing og 200 metur frí, har hon fekk tvey heimsmet – fyrst í innleiðandi umfarinum og síðani aftur í finaluni.

Hósdagin vann Heidi Andreasen gull í 50 metur frí, og fríggjadagin vann hon greinina 400 metur frí við tíðini 5 minuttir og 26.53 sekund.




*Heidi Andreasen vann fimm gullmerki í kappingini í Edmonton í Kanada og setti eisini trý heimsmet á ferðini. Her fær hon gullmerki um hálsin eftir 200 metur frí*

### Tvey heimsmet í somu grein

Í 200 metur frí fríggjadagin breyt Heidi Andreasen heimsmetið tvær ferðir. Í innleiðandi umfarinum hevði hon tíðina 2 minuttir og 36,28 sekund, og harvið tók hon heimsmetið frá Karen Liebovitch úr Ísrael.

Í finaluni kom hon á mál við tíðini 2 minuttir og 34,27 sekund, og tað var meira enn 10 sekund frammanfyri nærmasta kappingarneytan.

Sunnudagin fekk Heidi enn eitt heimsmet, hesuferð í 50 metur firvaldasvimjing. Hon kom á mál við tíðini 1 minutt og 27,61 sekund á 100 metra teininum. Tá hon vendi við 50 metrar, setti hon heimsmet á 50 metra teininum. Tíðin var tá 39,38 sekund.

Í 100 metur frí kom hon á mál við tíðini 1 minutt og 11,08 sekund og vann eisini hesa kappingina.

Í fimm kappingum vann Heidi Andreasen fimm gullmerki og setti trý heimsmet.

Heidi og venjari hennara á hesi ferðini, sviin Mats Brisenfeldt, koma heimaftur til Føroyar í dag, týsdagin.

# NSÍ í Danmark á Ólavsøku

**Lunnar verða næstu vikuna lagdir undir setningin, sum er at røkka eitt pláss hægri enn í fjør, tá ið NSÍ fekk silvurkrónur í landskappingini**

FYRIREIKING UTTANLANDS
*Jóannes Hansen*

Í fjør var Ólavsøkan gul og svørt. Eysturoyingurin vann kappingina millum 10-mannaførini, og NSÍ vann Løgmanssteypið. Tað er góður møguleiki fyri, at Eysturoyingurin fer at vinn á Ólavsøku og harvið at endurvinna FM heitið frá í fjør. Í hálvfinaluni varð greitt, at NSÍ fer ikki at endurtaka steypasigurin á Ólavsøku. NSÍ tapti fyri GÍ, og harvið verður NSÍ ikki partur í finaluni Ólavsøkudag.

Tað er eisini greitt, at eingin av 1. liðs spælarunum hjá NSÍ fer at vera eygnavitni, tá ið Eysturoyingurin fer at royna seg Ólavsøkuaftan. Í morgin fer besta fótbóltsliðið hjá NSÍ av landinum. Teir koma aftur í Vágar mikudagin í komandi viku.

NSÍ skal á venjingarlegu í Blokhus í Jyllandi. Nítjan spælarar er í ferðalagnum, umframt hjálparfólk og Jógvan Martin Olsen venjara, og Trygva Mortensen, sum hesa ferð er hjálparvenjari. Hann hevur drúgvar royndir sum venjari. Í fjør vandi hann EB/Streym, og hann hevur fleiri ferðir áður vant teir bestu í NSÍ. Nú er hann saman við Meinhardti Dalbúð venjari hjá smádreingjunum, sum fyrr í summar vunnu steypakappingina.

Tveir venjingardystir eru á skránni, meðan NSÍ er í Danmark. Hósdagin skulu teir spæla ímóti Randers Freja, sum er í næstbestu deildini. Venjari hjá Randers Freja er Lars Olsen, sum var liðformaður á danska landsliðnum, tá ið teir vunnu EM í 1992, og sum seinni hevur verið hjálparvenjari í Brøndby. Dysturin hósdagin verður spældur eitt sindur sunnanfyri Randers.

Ólavsøkuaftan skal NSÍ spæla ímóti U-23 liðnum hjá AaB. Tann dysturin verður ikki so langt frá Blokhus. Leygardagin fær AaB í fyrsta umfarinum í nýggja kappingarárinum vitjan av FCK. Ætlanin er, at NSÍ ferðalagið seinnapartin leygardagin skal fara á stadion í Aalborg at taka á við Toda Jónsson.



*Helgi L. Petersen og hinir úr NSÍ fara í næstum til Danmarkar á venjingarlegu*

### Góðar royndir

Í fjør var NSÍ á Akureyri í venjingarlegu í summarsteðginum. At tað var gagn í intensivu venjingini sást aftur í úrslitunum eftir summarsteðgin, tá ið NSÍ vann steypafinaluna og gjørdist nummar tvey í landskappingini.

– Tað eru ikki minst royndirnar frá í fjør, sum hava verið orsøkin til, at vit aftur í ár fara á venjingarlegu. Vit hava stórar avbjóðingar fyri framman. Í landskappingini eru vit so mikið væl fyri, at vit halda tað framvegis vera møguleika fyri at betra um úrslitið í fjør, tá ið vit fingu silvurmerkini. Og so skulu vit fyri fyrstu ferð royna okkum í Europa Cup. Ta uppgávuna ætla vit eisini at taka í stórum álvara, sigur Ian Højgaard, sum umframt at vera miðvallari eisini er samskipari hjá NSÍ.

Christian Høgni Jacobsen er aftur í Vejle. Tí spyrja vit Ian Højgaard, um teir hava fingið nakran nýggjan spælara.

– Í fjør høvdu vit góðar royndir við Ulrik Balling, sum, hóast hann var nógv skaddur, skoraði rættuliga avgerandi mál. Vit hava loddað dýpið í Danmark. Fleiri feløg í superliguni og í næstbestu deildini hava víst áhugað at leiga okkum onkrar spælarar, sum í løtuni ikki eru á besta liðnum. Men tað hevur kortini ikki eydnast at fáa nakran henda vegin. Trupulleikin er, at spælararnir ikki sjálvir hava áhuga. Ivaleyst síggja teir tað sum afturstig í karrieruni, um teir skulu til Føroya, sigur Ian Højgaard.

NSÍ fór hóskvøldið undir aftur venjingarnar, eftir at teir høvdu hildið frí síðani 9. juli. Sunnudagin spældu teir á Gøtu stevnuni. Úrslitið var 6-1 til NSÍ. Í 2. hálvleiki var Gert Langgaard í álopinum undir liðini á Helga L. Petersen. Tað ber ikki til at siga annað, enn at tað gekk sum eftir ánni, tí Gert skoraði fýra mál. Hini NSÍ málini skoraðu Helgi L. Petersen og Sjúrður Jacobsen. Einsamalla málið hjá ikki serliga væl mannaða GÍ liðnum skoraði Bartal Eliasen.

Hvussu vánirnar hjá NSÍ vera at vinna fyrsta FM heitið verður ikki minst treytað av, hvussu tað fer at gangast teimum sunnudagin eftir, at teir eru komnir aftur av venjingarleguni í Danmark. Sunnudagin 3. august skal NSÍ spæla í Gundadali ímóti HB.

Europa Cup avbjóðingin verður seinni í august. Hósdagin 14. august skal NSÍ spæla á Svangaskarði ímóti Lyn, og hósdagin 28. august skulu teir spæla í Oslo.



Statoil Kring Føroyar:

# Danir í flokki fyri seg



*Thomas Japp Hansen frammanfyri Ivan Kristensen. Hesir báðir súkklararnir úr Gladsaxe Cykel Klub endaðu á fyrsta og øðrum plássi í ársins Statoil Kring Føroyar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Teir donsku súkklararnir úr Gladsaxe vóru sterkari enn føroysku súkklararnir í kappingini Statoil Kring Føroyar, og Thomas Japp Hansen fór við samlaða sigrinum. Besti føroyingurin var Gunnar Dahl-Olsen, og hann endaði á triðja plássi**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Tað var longu eftir næsta teinin, sum var í Eysturoynni, at Thomas Japp Hansen legði seg avgerandi framum hinar í feltinum. Besti føroyski súkklarin í kappingini, Gunnar Dahl-Olsen, misti tá so nógv, at møguleikin fyri at vinna var nærum eingin.

Seinasti teinurin varð koyrdur úr Eysturoynni til Havnar í gjár. Fyrstur á mál var Thomas Japp Hansen, og honum á baki var Ivan Kristensen, sum eisini endaði nummar tvey í samlaðu kappingini.

Gunnar Dahl-Olsen fekk triðja plássið bæði á seinasta teininum og í samlaðu kappingini.

Thomas Japp Hansen hevur allatíðina verið favorittur at vinna, og hann livdi eisini upp til hetta heitið í kappingini.

Undan síðstu etapuni var hann nakrar minuttir frammanfyri Ivan Kristensen, og tí skuldi Thomas Japp Hansen bara syrgja fyri, at hann ikki misti Ivan burtur á hesum seinasta teininum.

### Sterkur vinnari

Thomas Japp Hansen vann samlaðu kappingina, og tað er hann sjálvsagt sera fegin um. Hann hevur gjørt vart við seg við góðum úrslitum í Danmark. Nevnast kann, at hann endaði á tólvta plássi í danmarksmeistaraskapinum í einkultstarti. Hetta úrslitið er merkisvert, tí í slíkum kappingum verður kappast ímóti yrkissúkklarum, sum eru við í heimselituni.

– Eg vil gjarna royna at verja mítt heitið um eitt ár. Hetta er ein góð kapping, og hon er væl fyriskipað, segði Thomas Japp Hansen eftir síðsta umfarið sunnudagin.

Hann sigur, at teinarnir eru sera harðir, og at landslagið er gott til súkkling. Súkklarar í Danmark hava ikki somu møguleikar at súkkla í tungum brekkum sum her.

–Eg visti ikki frammanundan, hvussu sterkir føroyingarnir og íslendingarnir vóru, og tí hevði eg onga hóming av, hvussu hørð kappingin fór at vera. Tað hevði sjálvandi verið stuttligari, um fleiri súkklarar vóru við, men tað hevur sum heild verið ein góð kapping, segði Thomas Japp Hansen, sum eisini nýtti høvi at rósa Gunnari Dahl-Olsen fyri at koyra væl í hesi kappingini.

Stóra styrkin hjá Thomas Japp Hansen er einkultstarturin, og hann vann eisini báðar einkultstartarnar í hesi kappingini – í Klaksvík og á Sandoy.

### Gunnar væl nøgdur

– Eg eri sera væl nøgdur við triðja plássið. Teir fingu stórt forspring beinanvegin aftaná etapuna í Eysturoynni, og tí fór eg eftir triðja plássinum eftir tað, sigur Gunnar Dahl-Olsen.

Undan seinasta teininum var Gunnar Dahl-Olsen tjúgu sekund frammanfyri Niels Jakob Thomsen. Tí skuldi Gunnar bara ansa eftir, at hann ongantíð misti Niels Jakob úr eygsjón.

–Eg hugdi allatíðina eftir Niels Jakob og syrgdi fyri at fylgjast við honum. Tað hevði ongan týdning, hvar eg endaði á hesi etapuni, bara eg varðveitti triðja plássið, sigur Gunnar Dahl-Olsen.

Tað eydnaðist Gunnari at vinna etapuna í Suðuroynni í harðari kapping við Thomas Japp Hansen.

| Nr | Navn | Felag | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Klaksvík, 10 km | | Eystruroy, 116 km | | Sandur, 21 km | | Suðuroy, 73 km | | Streymoy, 95 km | | Samlað tíð | | Km/t |
| | | Tíð | Plac. | TíðPlac | Tíð | Plac. | Tíð | Plac. | Tíð | Plac | 315 km | | | |
| 1 | Thomas Japp Hansen | CCG | 00.13.12 | 1 | 03.17.43 | 2 | 00.30.03 | 1 | 02.00.54 | 2 | 02.43.37 | 1 | 08.45.29 | 35,97 |
| 2 | Ivan Kristensen | CCG | 00.15.11 | 4 | 03.17.43 | 1 | 00.31.28 | 4 | 02.01.32 | 3 | 02.44.05 | 2 | 08.49.59 | 35,66 |
| 3 | Gunnar D. Olsen | TSF | 00.14.47 | 3 | 03.29.16 | 4 | 00.30.35 | 2 | 02.00.53 | 1 | 02.48.08 | 3 | 09.03.39 | 34,77 |
| 4 | Niels Jakob Thomsen | CCG | 00.14.15 | 2 | 03.27.19 | 3 | 00.32.01 | 6 | 02.02.17 | 4 | 02.48.08 | 4 | 09.04.00 | 34,74 |
| 5 | Gregers Rosdahl | CCG | 00.16.01 | 6 | 03.33.06 | 5 | 00.32.02 | 7 | 02.03.11 | 5 | 02.49.11 | 5 | 09.13.31 | 34,15 |
| 6 | Gunnlaugur Jonasson | HFR | 00.15.45 | 0 | 03.34.51 | 6 | 00.31.08 | 3 | 02.10.06 | 7 | 02.51.16 | 6 | 09.23.06 | 33,56 |
| 7 | Gunnar M. Zoega | HFR | 00.15.45 | 0 | 03.38.38 | 8 | 00.32.28 | 8 | 02.10.08 | 8 | 02.56.02 | 9 | 09.33.01 | 32,98 |
| 8 | Eli Christiansen | TSF | 00.16.16 | 7 | 03.44.17 | 9 | 00.34.28 | 10 | 02.10.34 | 9 | 02.56.02 | 7 | 09.41.37 | 32,50 |
| 9 | Alfreð Harðarson | HFR | 00.15.45 | 0 | 03.35.07 | 7 | 00.35.59 | 12 | 02.21.49 | 11 | 02.59.43 | 10 | 09.48.23 | 32,12 |
| 10 | Haukur M. Sveinsson | HFR | 00.15.45 | 0 | 03.55.59 | 10 | 00.35.26 | 11 | 02.19.56 | 10 | 03.00.47 | 11 | 10.07.53 | 31,09 |
| 11 | Jørgen Green | RCR | 00.16.48 | 8 | 04.01.32 | 11 | 00.34.19 | 9 | 02.36.18 | 13 | 03.20.23 | 12 | 10.49.20 | 29,11 |
| 12 | Stig Helm Hansen | CCG | 00.17.43 | 10 | 04.05.18 | 12 | 00.37.14 | 13 | 02.36.17 | 12 | 03.30.28 | 13 | 11.07.00 | 28,34 |
| | Ungdómar | | | | | | | | | | | 261 km | | |
| 1 | Bergur Ingemarsson | TSF | 00.18.48 | 14 | 03.33.46 | 1 | 00.38.12 | 15 | 02.26.32 | 1 | 02.57.37 | 1 | 09.54.55 | 26,32 |
| Ikki gjøgnumført | | | | | | | | | | | | | | |
| Sverri M. Edvinsson | | TSF | 00.15.32 | 5 | 00.00.00 | | 00.31.29 | 5 | 02.10.06 | 6 | 02.56.02 | 8 | | |
| Beinir Rasmussen | | TSF | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Kári Simonsen | | TSF | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Evald Rasmussen | | TSF | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 03.56.40 | 14 | | |
| Christian Guttesen | | TSF | 00.18.46 | 13 | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Jákup Johansen | | ECR | 00.17.34 | 9 | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Bárður Husgaard | | OCK | 00.23.06 | 15 | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Danjal Michaelsen | | TSF | 00.18.11 | 12 | 00.00.00 | | 00.41.25 | 16 | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Eyðtór Joensen | | TSF | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |
| Hans Krosstein | | TSF | 00.17.44 | 11 | 03.30.30 | 2 | 00.37.49 | 14 | 00.00.00 | | 00.00.00 | | | |